ítróttur

Nr. 47 • týsdagur • 9. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Rúni er norskur steypavinnari

Saman við BK Tromsø var Rúni Weihe um vikuskiftið við til at vinna norsku steypafinaluna í flogbólti

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at Bárður B. Mikkelsen fyri einum ári síðani vann donsku steypafinaluna, vóru tað í ár Rúni Weihe og Tromsø, sum tóku føroyska ískoyti til eina útlendska steypafinalu

Fyri føroyskan flogbólt var leygardagurin ein av teimum heilt søguligu døgunum.

Tá eydnaðist tað nevnliga føroyska flogbóltsútisetanum, Rúna Weihe, og liðfeløgum hansara í Tromsø at vinna norsku steypafinaluna. Hetta hendi, eftir at teir í einum spennandi og skiftandi dysti vunnu 3-2 á

Hetta var sjeyndu ferð, at Tromsø vann norsku steypafinaluna, og tað merkir, at teir nú saman við tveimum øðrum feløgum hava norskt met í steypakappingini.

Kanska greipa

Tromsø vann annars tey bæði fyrstu settini, og tað tóktist als ikki, sum skuldi liðið hava nakrar sum helst trupulleikar av mótstøðuni úr Kristianssund.

Sjálvur Helt Rúni Weihe fyri, at spælið hjá teimum gekk sera væl tey bæði fyrstu settini, men at teir onkursvegna tóku sær av løttum, tá hesi bæði vórðu vunnin.

Kristianssun slapp tí aftur upp í part, og fram til helvtina av avgerandi javnbrótaranum var ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um ein sigur til Rúna og teir, men tá teir so fingu nakrar bóltar á rað miðskeiðis í hesum, nærkaðist sigurin av álvara.

Sum sagt, so gjørdist endin, at Tromsø og Rúni vunnu gullmerkini, og nú tykjast teir stevna beinleiðis mót greipuni. Tromsø skal um tvær vikur spæla fyrsta finaludystin móti Dragvål. Í landskappingini higartil hevur Tromsø staðið seg nógv best, og tí eru tað nógv, sum roknað við, at at tað eisini skal eydnast Tromsø at taka hetta steypið, so talan kann væl gerast um tvífalt gull til Rúna, longu fyrsta árið hann roynir seg uttan fyri føroysku landoddarnar.

Heimsmet til Heidi

Heidi Andreasen hevur júst tikið lut í Danish-Open kappingini, og her gjørdist talan um fimm gullmerki og eitt heimsmet

SVIMJING
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Føroyski gullfiskurin, Heidi Andreasen, er í fullari ferð við at fyrireika seg til komandi paraolympisku leikirnar, og skal seinasta luttøka hennara nýtast sum barometur, so er nógv gott í væntu frá henni.

Í Danish Open kappingini í Esbjerg um vikuskiftið tók Heidi sær av ikki færri enn fimm gullmerkjum og einum silvurmerki, og hartil kappaði hon meira enn trý sekund burtur av heimsmetinum í einari kapping. Hetta var í 50 metra firvaldasvimjing, har talan so eisini gjørdist um gullmerki, meðan hini gullmerkini vórðu vunnin í 50, 200 og 400 metra frísvimjing og í 200 metra blandaðari svimjing. Silvurmerkið vann hon í 100 metur blandaðari svimjing

Ikki í toppform

Men hóast góðu úrslitini í Esbjerg, so heldur Heidi Andreasen ikki sjálv, at hon er komin í so góða venjingarstøðu, sum hon kann koma í.

Við Útvarpið sunnudagin helt hon fyri, at talan fyrst og fremst var um venjing fram ímóti paraolymisku leikunum, og hon tí ikki hevði sett sær so stórar vónir undan kappingini.

Men hon mátti tó viðganga, at tá eitt heimsmet so kortini er millum úrslitini, so fær tað ikki annað enn sæð gott út, og so er spurningurin bara, hvørt kappingarneytarnir hjá Heidi kanska goyma okkurt av orku síni, ella um talan skal gerast um satt gullregn frá gullfiskinum í heyst.

Sjálv heldur hon ikki, at venjingarstøðan er nóg góð í løtuni, men í øllum førum spurdist eitt heimsmet burturúr, tá Heidi Andreasen um vikuskiftið tók lut í Danish Open í Esbjerg

79% javnleikir í Linares

Í superstórmeistarakappingini í Linares, endaði 33 út av 42 talvum við javnleiki. Sera keðilig reklama fyri talvítróttin

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Vladimir Kramnik, sum vann kappingina við 7 stigum av 12 møguligum, vann tvey talv og leikti tíggju javnleikir. Garry Kasparov vann einans eitt talv og telvaði ellivu javnleikir. Kasparov leikti tó bert tveir stuttir javnleikur undir 25 leikir, og royndi av øllum alvi at vinna sær fleiri stig í hinum talvunum. Hann hevði eisini vinnandi støður í fleiri talvum, men hvørja ferð forðaði tíðareyð honum at hála seinasta kastið inn.

Kasparov brúkti sum heild ov nógva tíð í Linares. Helst er orsøkin tann, at hann ikki hevur telvað nógv seinasta árið.

Kramnik hinvegin leikti heili sjey javnleikir, ið vóru undir 25 leikir. Kramnik er tí eingin dámligur vinnari av Linares 2004. Leko og Kasparov blivu nr. 2 við 6,5 stigum, meðan Radjabov og Topalov fingu 6 stig. Aftastir vórðu Shirov og Vallejo við 5 stigum.

FM á páskum

Tofta Talvfelag skipar í ár fyri FM-einstaklingakappingini á páskum.

Seinast toftamenn átóku sær at standa fyri FM-kappingini var í 1982. Tá vann Jens Kristian Hansen FM framanfyri Jóan Pætur Midjord og Hans Jacob Petersen. 1. bólk vann Jefri Justinussen, meðan Rani Nolsøe vann 2. bólk. Unglingameistarin í 1982 varð Haldur Suni Johansen (Kelda: Føroysk Telving í 20. øld, eftir Suna Merkistein.)

Telvað verður helst í døgunum 3-10. apríl. Fleiri og nærri upplýsingar verða til taks komandi vikurnar. Sí annars:

www.faroechess.com.

Aftur í ár ger Sosialurin tað vælumtókta fótbóltsblaðið

Sosialurin er við frá byrjan, tá fótbóltsturn fer á rull miðskeiðis í mars mánaði. Blaðið hevur seinastu mongu árini havt umfatandi umrøðu av fótbóltskappingini, og niðurstøðir verður eftur í ár. Vit marksetu hyggjanna av viggja fótbóltsmonnum við einum stórum og vøkrum mykablaði – Fótbóltur 2004.

Í blaðinum verður eisiðan gjørd upp, mi felagini fara at jagsta gull og heiður. Vit greiða frá, hvussu felagini eru fyri og vit kosið við leikarar og vergarar bring landið. Hávuðbeldstuttin verður lagður á bestu mundbeldstóna, men eisini 2. deild, kvinnurnar, ólsarar og landsliðið líka í mánaðar í blaðinum.

Samtlaða upplagið verður um 11.000. Blaðið verður á útgávudagnum latið eftur teimum, sum keypa ella halda Sosialin, umframt at blaðið verður fer at liggja hjarvstí í leyvsaðu.

HB 1904 · B36 · B68 · NSÍ · MB · EB/Streymur · VB · VB · 1906 · KÍ

Talvið hesa vikuna

Rógvi W. Rasmussen luttók í seinastu viku í einari sterkari kvikkapping (25 min. til talvið) í Íslandi. Rógvi fekk 6,5 stig av 9, og vann virðisløn sum fremsti telvari undir 2200 í rating.

Havnarmaðurin mundi koppað sjálvum GM Ivan Sokolov (2706), sum vit síggja í talvinum niðanfyri.

Ivan Sokolov (2706) – Rógvi W. Rasmussen (2198)
Kvikkapping Hróksins, (25. min), 01.03.2004

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Ric3 Rif6 4.e3 e6 5.Rif3 Ribd7 6.Bd3 dxc4 7.Bxc4 b5 8.Bd3 Bb7 9.0–0 a6 (Kend støða í avbýtisvariantinum í drottningaindiskum) **10.a4 b4 11.Rib1 c5 12.Ribd2 Be7 13.Re1 cxd4 14.exd4 0–0 15.a5 Bd5 16.Fe2 Fc8** (Rógvi hevur telvað byrjanarspælið væl, og støðan er púra jøvn) **17.Ric4 Fb7 18.Bf4 Rfd8 19.Ricd2 Rib8!** (Riddarin skal leggja trýst á d-finnuna) **20.Rec1 Ric6 21.Ric4 Ra7 22.Rie3 Bxf3 23.Fxf3 Rixd4 24.Fxb7 Rxb7 25.Bxa6 Ra7 26.Bc4 Rid5** (Rógvi hevur lítlan fyrimun, men tíðin er knøpp í kviktalvi) **27.Bg3**

27...Bg5! 28.Bxd5? Rie2+ 29.Kf1 Rixg3+? (Vinnandi er sjálvsagt: 29...Rixc1! 30.Bc4 Rid3 31.Rd1 Rixb2 32.Rxd8+ Bxd8. Rógvi segði, at báðir høvdu yvirsæð, at rókurin á d8 var dekkaður av bispinum! **30.hxg3 Bxe3 31.fxe3 exd5 32.Rc5 Kf8 33.Rd1** (Støðan er helst vunnin hjá hvítum nú) **33...d4 34.Rxd4 Rxd4 35.exd4 Ke7 36.Ke2 Kd6 37.Kd3 Ra6 38.Kc4.** Og Rógvi gavst **1–0.**

Støðumynd eftir 27.Bg3

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

Bilur + 2 fólk til Danmarkar úr 2.720,-

Føroyar – Danmark ella hinvegin
Tórshavn – Hanstholm ella hinvegin

Lágarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.720	3.200	-	-	-	4.320
Bilur + 3 fólk	3.580	4.300	-	5.110	5.530	-
Bilur + 4 fólk	4.440	5.400	6.080	-	-	-
Bilur + 5 fólk	5.300	6.500	-	-	-	-

Háarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	3.720	4.160	-	-	-	5.800
Bilur + 3 fólk	4.780	5.440	-	6.820	7.420	-
Bilur + 4 fólk	5.840	6.720	7.560	-	-	-
Bilur + 5 fólk	6.900	8.000	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Noregs úr 1.960,-

Føroyar – Noreg ella hinvegin
Tórshavn – Bergen ella hinvegin

Lágarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.960	2.280	-	-	-	2.920
Bilur + 3 fólk	2.640	3.120	-	3.600	3.840	-
Bilur + 4 fólk	3.320	3.960	4.440	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.000	4.800	-	-	-	-

Háarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.480	2.960	-	-	-	3.760
Bilur + 3 fólk	3.300	4.020	-	4.620	5.100	-
Bilur + 4 fólk	4.120	5.080	5.720	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.940	6.140	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Hetlands úr 1.420,-

Føroyar – Hetland ella hinvegin
Tórshavn – Lerwick ella hinvegin

Lágarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.420	1.710	-	-	-	2.240
Bilur + 3 fólk	1.860	2.295	-	2.715	2.970	
Bilur + 4 fólk	2.300	2.880	3.280	-	-	3.940
Bilur + 5 fólk	2.740	3.465	-	-	-	-

Háarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	1.880	2.240	-	-	-	2.900
Bilur + 3 fólk	2.460	3.000	-	3.480	3.810	-
Bilur + 4 fólk	3.040	3.760	4.160	-	-	5.080
Bilur + 5 fólk	3.620	4.520	-	-	-	-

Bilur + 2 fólk til Íslands úr 2.330,-

Føroyar – Ísland ella hinvegin
Tórshavn – Seyðisfjørður ella hinvegin

Lágarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	2.330	2.650	-	-	-	3.530
Bilur + 3 fólk	3.045	3.525	-	4.185	4.545	-
Bilur + 4 fólk	3.760	4.400	4.960	-	-	-
Bilur + 5 fólk	4.475	5.275	-	-	-	-

Háarstíð	Coucettir	4-koyggjukamar, inn.	4-koyggjukamar, utt.	3-koyggjukamar, inn.	3-koyggjukamar, utt.	2-koyggjukamar, utt.
Bilur + 2 fólk	3.080	3.440	-	-	-	4.640
Bilur + 3 fólk	4.020	4.560	-	5.460	5.940	-
Bilur + 4 fólk	4.960	5.680	6.480	-	-	-
Bilur + 5 fólk	5.900	6.800	-	-	-	-

Prísirnir í lágarstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 7,0 m longd og 2,5 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

Prísirnir í háarstíð eru galdandi fyri 1 persónbil (upp til 5,0 m longd og 1,9 m hædd) og valda talið av ferðandi annan vegin.
Børn yngri enn 6 ár, ið ikki hava egna koyggju, ferðast ókeypis.

SMYRIL LINE